# Almanna- og heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 21. januar 2025 |
| Mál nr.: | 26/00385-2 |
| Málsviðgjørt: | JEB/LP |
| Ummælistíð: | 21. januar til 30. januar 2026 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**fyrra byggstig fyri sambýlið í Birtulíð í Miðvági**

**§ 1.** Landsstýriskvinnuni verður heimilað at fara undir at dagføra og umvæla ognirnar á Leitisvegi 70 í Miðvági til sambýli til fólk við sálarligum og sosialum avbjóðingum og fólk við menningartarni og autismu. Útreiðslurnar kunnu í mesta lagi verða 19,8 mió. kr.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildið 31. desember 2031.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Endamálið við uppskotinum er at heimila landsstýriskvinnuni at fara undir fyrra byggistig til nýtt sambýli í Miðvági, sum fer at eita Sambýlið í Birtulíð.

Sambýlið í Birtulíð verður til í alt 19 fólk, og verður bygt til fólk við sálarligum og sosialum avbjóðingum, umframt til fólk við menningartarni og samansettum avbjóðingum harímillum autismu. Meginparturin av teimum, sum fara at búgva á sambýlinum, hava tørv á støðugum stuðuli og umsorgan alt samdøgrið.

Í sambandi við fyrireikingar at byggja nýtt sambýli í Miðvági bleiv ein ogn keypt, ið inngongur í verkætlanina. Ognin er á Leitisvegi 70, og fevnir um eina íbúðarlon við sjey íbúðum (byggiár 1987 og umvælt í 2022), ein verkstaðsbygningur (byggiár 1940), og ein millumbygningur (byggiár 1940). Í sambandi við keypið eru bygningarnir kannaðir, og avgjørt er, at smærri umvælingar skulu gerast á íbúðarlonina, meðan verkstaðsbygningurin skal heildarumvælast og millumbygningurin takast niður.

Í sambandi við fyrireikingarnar er ein lendis- og skipanætlan gjørd fyri økið, har sambýlið verður, sí fylgiskjal 2. Uttanumøkið skal gerast innbjóðandi og skipast saman við matr. nr. 149n.

Samstundis sum ognin varð keypt,  varð gjørt av, at nýbygningurin skuldi bjóðast út í eini heildararbeiðstøku.

Tvær byggiskráir eru fyri verkætlanina, onnur fyri ognirnar á Leitisvegi og hin fyri nýbygging á matr. nr. 149n. Hendan seinna er ikki endaliga liðug.

Landsverk hevur gjørt uppskot til ætlan, har mælt verður til, at byggingin fer fram í tveimum stigum í tíðarskeiðinum 2026–2028.

Fyrra byggistig snýr seg um at dagføra og umvæla verandi ognir á Leitisvegi 70. Talan er um íbúðarbygning við sjey íbúðum, sum skulu umvælast og dagførast, niðurtøku av millumbygningi og heildarumvæling av verkstaðsbygningi. Verkstaðsbygningurin verður savningarstað fyri alt sambýlið við felags hentleikum so sum starvsfólkaøkið, goymsla, tøknirúm og mulitirúm.

Seinna byggistig verður at byggja ein bygning við 12 íbúðum, ið verða bygdar í tveimum eindum við seks íbúðum í hvørjari, umframt stórkøk, sum skal gera mat til alt sambýlið. Byggistig 2 verður boðið út í heildararbeiðstøku á vári 2026. Tá útboð og lisitatión hevur verið, og kostnaðurin fyri byggistig 2 er kendur, verður ískoyti gjørt til hesa verklagslóg.

Innihaldið í byggistig 1 er nærri lýst í byggiskránni fyri Leitisveg, sum er lagt við sum fylgiskjal 1.

Sambýlið í Birtulíð (byggistig 1 og 2) er liður í størri arbeiði at niðurleggja smærri stovnar í ofta ótíðarhóskandi sethúsum, og byggja betri sambýli, sum eru bygd til endamálið. Sambýlið kemur ístaðin fyri trý sambýli í Vágunum í trimum ymiskum sethúsum. Hesi skulu í sama viðfangi ávikavíst uppsigast og seljast.

Samstundis sum farið verður undir byggistig 1, verður byggistig 2 fyrireikað.

Við hesum uppskoti verður bygt og umvælt til tørvin og endamálið, og soleiðis fáast munandi betri umstøður og virðiligir karmar fyri bæði húsfólk og starvsfólk.

Eisini fara karmarnir at styðja undir, at tey, ið búgva har, kunnu liva eitt so vanligt lív, sum til ber, í umstøðum, ið stuðla heldur enn órógva møguleikan at mennast og trívast.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Ongin lóggáva er á økinum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at geva landsstýriskvinnuni heimild at brúka upp til 19,8 mió.kr. til at fyrireika, dagføra og umvæla ognirnar á Leitisvegi 70, sum er fyrra byggistig av í alt tveimum byggistigum fyri Sambýlið í Birtulíð í Miðvági.

Endamálið við lógaruppskotinum er at betra um bústaðarumstøðurnar hjá fólki við sálarligum og sosialum avbjóðingum, umframt ein part til fólk við menningartarni og autismu.

Endamálið er somuleiðis at byggja eitt sambýli fyri tey í dag trý sambýlini, sum eru í Vágum til hesar málbólkar, og savna virksemi á einum stað og geva fólki og starvsfólki munandi betri umstøður at virka og mennast í.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Lógaruppskotið hevur við sær, at fólk við sálarligum og sosialum avbjóðingum, og ein bólkur við menningartarni og autismu, hava møguleika at flyta í ein tíðarhóskandi bústað og virðiligar umstøður, sum eru serliga tillagaðar til teirra tørv, tí umbygt og bygt verður til endamálið. Øll fáa tey egna íbúð, egna inngongd og egið baðirúm.

Byggistig 1 fevnir um at umvæla tær sjey íbúðirnar á Leitisvegi 70 til teirra, sum í dag búgva á Ovaravegi í Sørvági. Hesi hava samansettar avbjóðingar, og millum annað menningartarn og/ella autismu. Fólkini hava í sambandi við vatnskaða í Sørvági áður búð í lonini á Leitisvegi, sum er hóskandi til teirra. Ein íbúð verður til fólk, ið eru serliga viðkvæm fyri óljóði og gangi.

Umframt at umvæla tær sjey íbúðirnar, fevnir byggistig 1 eisini um at heildarumvæla verkstaðsbygningin og at taka niður ein millumbygning, ið er ímillum lonina við íbúðunum og verkstaðsbygningin.

Ognirnar á Leitisvegi 70, matr. nr. 341, eru staðsettar beint við síðurnar av matr. nr. 149n, har nýbygingurin verður bygdur. Bygningarnir, sum skulu umvælast og dagførast, eru í alt áleið 720 m2. Aftrat hesum er stórt parkeringsøki og rúm fyri at Almannaverkið við tíðini kann brúka part av ognini til annað virksemi.

Byggistig 2 verður á matr. 149n, ið er keypt til endamálið. Grundøkið er 4.841 $m^2$ og er keypt frá Vága kommunu Við tinglýsing o.a. er samlaði kostnaðurin fyri matr. 149n 1,7 mió. kr.

Á matr. nr. 149n verður bygt sambýli við 12 íbúðum í tveimum eindum við atgongd til felagshøli við felagskøki.

Landsverk leggur upp til at byggibúningin til byggistig 2, verður boðin út skjótast til ber og sostatt verður partur av at fyrireika byggistig 2. Ætlanin at fremja byggibúningina sum eina framskotna arbeiðstøku er fyri at minka um váðar og samstundis tryggja eitt betri og tryggari grundarlag fyri komandi heildararbeiðstøku. Sambært tíðarætlanin verður byggibúningin boðin út í januar 2026, soleiðis at arbeiðið kann byrja í mars 2026 og verða liðugt á sumri 2026. Við hesum kann heildararbeiðstakari arbeiða víðir eftir summarfrítíðina.

Hevði byggibúningin verið partur av verklagslógin til fyrra byggistig, var ikki møguligt at undirskriva sáttmála við arbeiðstakara at gera byggibúningina, fyrr enn verklagslógin var samtykt. Við hesum hevði ikki borið til at fingið lendisarbeiðið liðugt áðrenn summar 2026, sum hevði havt ta avleiðing, at heildararbeiðstøkan ikki kundi verið boðin út sambært ætlan, í mai/juni.

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið var til ummælis hjá: ***(kallað er inntil hoyringsfund við niðanfyri partar 23. januar, og ætlanin er at senda teimum lógaruppskotið 21. januar. Hoyringsfreistin er sett til 30. januar, fyri at klára at halda freistirnar)***

- Almannaverkinum
- MEGD
- Javna
- Sinnisbata
- Pedagogfelagnum
- Brekumboðnum
- Fíggjarmálaráðnum
- Landsverki

Hoyringin fór fram í januar 2026. Skipað varð fyri hoyringarfundi og framløgu, tá MEGD, Javni, Sinnisbati, Pedagogfelagið, Brekumboðið, Almannaverkið og Landsverk vóru til staðar. Lógaruppskotið, byggiskrá, lendis- og skipanarætlan fyri økið í Miðvági og tíðarætlan hava verið til ummælis.

*Viðgerð av viðmerkingunum*
Almanna- og heilsumálaráðið hevur fingið viðmerkingar frá xx.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

Higartil eru brúktar 14,4 mió. kr. tilsamans

11,8 mió. kr. eru brúktar til at keypa ognina á Leitisvegi, 1,7 mió. kr. eru brúktar at keypa lendi, matr. nr. 149n, og 900 tús. kr. eru higartil brúktar til fyrireiking.

Landsverk hevur gjørt eina kostnaðarmeting fyri byggistig 1, t.e. hvat tað fer at kosta at dagføra íbúðarbygningin, taka millumbygningin niður og heildarumvæla verkstaðsbygningin.

Kostnaðarmetingin er gjørd við støði í byggiskrá. Av tí at tað er tíðliga í tilgongdini, kunnu tillagingar væntast so hvørt verkætlanin mennist. Tó skal hetta verða innfyri játtanina til byggistig 1.

Talan er um niðurtøku, umvælingar og dagføringar av verandi bygningum. Arbeiðið verður skipað í stigum og boðið út í smærri arbeiðstøkum.

| ***Í mió. kr.*** | **Byggistig 1** | **Byggistig 2** |
|---|---:|---:|
| Keypa Leitisvegi 70 | 11,8 | |
| Keypa lendi matr. nr. 149n | | 1,7 |
| Fyrireiking | 0,45 | 0,45 |
| ***Higartil er brúktar tilsamans*** | ***12,3*** | ***2,1*** |
| | | |
| Byggibúning av matr. nr. 149n (verður brúkt áðrenn verklagslóg – verður skrivað inn, tá útboðið hevur verið) | | - |
| Fyrireiking | | 1,1 |
| | | |
| Dagføra og umvæla verandi bygningar á Leitisvegi 70 við heimild í verklagslóg *meting* | 19,8 | |
| Heildararbeiðstøkan (skal bjóðast út) | | - |
| | | |
| **Tilsamans** | **32,1** | |

Byggibúning av matr. nr. 149n verður boðið sum ein framskotin arbeiðstøka, t.e. at lendisarbeiðið verður gjørt áðrenn heildararbeiðstøkan verður boðin út. Hetta verður gjørt fyri at minka um váðar og fyri at tryggja betri grundarlag fyri komandi heildararbeiðstøku. Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í januar 2026, soleiðis at arbeiðið væntandi kann byrja í mars 2026 og verða liðugt á sumri í 2026. Byggibúningin er tí ikki partur av verklagslógina fyri fyrra byggistig, men er partur av at fyrireika ískoyti til verklagslógina, ið eftir ætlan verður løgd fyri Løgtingið á ólavsøku.

Umframt arbeiðið at gera byggibúningina, verður kostnaður av at fyrireika, t.e. at fyrireika byggiskrá til heildararbeiðskrá, gera útboð av byggibúning, útboð av heildararbeiðstøku og samsýning til tilboðsgevarar, sum lata tilboð til heildararbeiðstøkuna.

Byggistig 2 fevnir um nýbygging av einum bygningin á áleið 850 m2, umframt parkering, útiøki og at skipa økið fyri at tryggja, at økini virka saman sum eitt bústaðargrannalag.

Lógaruppskotið fer at hava øktan rakstur við sær, tó so at eindarkostnaðurin verður munandi bíligari. Sí fylgiskjal x. Í løtuni eru tað 16 sambýlispláss/serskipan í teimum trimum stovnunum har vesturi. Eftir ætlan, kemur nýggja sambýlið at rúma 19 plássum.

Almannaverkið hevur mett um kostnaðin at reka sambýlið. Árligi rakstrarkostnaðurin er í dagsins prísum mettur at vera xx mió. kr. netto. Umframt eru eingangsútreiðslur í sambandi við flyting og stovnan mettar at vera xxx.xxx kr. Út frá dagsins prísum, verður dagsprísurin tá xx kr. pr. húsfólk.

Tey trý sambýlini, ið flutt verður úr, tá Sambýlið í Birtulíð er liðugt, er tvey leigumál og ein ogn hjá landinum. Leiguútreiðslurnar eru fyri annað, ið er 271 m2, 184 tús. kr. um árið, fyri hitt, ið er 325 m2, 182 tús. kr. um árið. Sbrt. verandi tíðarætlan, kann eina leigumálið uppsigast í desember 2026. Hitt leigumálið og ognin hjá landinum kunnu væntandi uppsigast/seljast eftir at øll verkætlanin er liðug í januar 2029.

Ognin er á Traðarvegi 34, Sandavágur, verður eftir ætlan seld, tá Sambýlið við Birtulíð letur upp. Ilt er at meta um søluprísin. Landsverk hevur gjørt eina meting út frá, hvat líknandi ognir verða seldar fyri í hesum økinum. Mett verður at søluprísurin er uml. 5 mió. kr.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur við sær økt virksemi fyri byggivinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur sum frálíður jaligar avleiðingar fyri umhvørvið, tí Almannaverkið ætlar at leggja inn grønar málarar, løðistøðir til el-bilar, so at infrastrukturin á Almannaverkinum kann tillagast, so at gjørligt verður at leggja um til el-bilar ístaðin fyri verandi bensin og diesel bilar.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri tey, ið fara at búgva í sambýlinum. Bústaðarumstøðurnar vera munandi betri, eitt nú fáa tey egna íbúð við egnum vesi og baðirúmi. Sambýlið verður bygt til endamálið og til tann tørv húsfólkini hava.

Mánaðarliga húsaleigan verður ásett í stigaskipan, ið er góðkent av landsstýrisfólkinum, og verður ásett í mun til støðd og dygd eftir góðkendum leisti, sum er galdandi, tá fólkini flyta inn.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið stuðlar undir ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009.

Sambært grein 28 í breksáttmálanum viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, hava rætt til nøktandi lívskor og tískil eisini rætt til nóg góðan bústað. Somuleiðis viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, sleppa upp í almenn bústaðartiltøk.

Lógaruppskotið er eitt stig á leiðini at liva upp til hesa viðurkendu áseting.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar markaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið heimilar landsstýriskvinnuni at nýta upp í 19,8 mió. kr. til at dagføra verandi ognir á Leitisvegi 70.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

Ein avtala er gjørd millum Vága Kommunu og landið um at ein almenn gøta gongur ígjøgnum ovara part av matr. nr. 149n. Henda avtala er tinglisin á ognina sum ein gøturættur, ið liggur opin fyri almenninginum. Somuleiðis er eitt eldri seyðahús, ið skal varðveitast á ognini, matr.

nr. 149n. Gøtan verður projektera av heildararbeiðstakara í samráð við byggiharra, Vága Kommunu og brúkara.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

### 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Ja | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Ja | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Greinin heimilar landsstýriskvinnuni at fara undir fyrra byggistig av í alt tveimum byggistigum fyri sambýlið í Birtulíð í Miðvági.

Byggistig 1 snýr seg um at umvæla og dagføra keypta ogn á Leitisvegi 70 í Miðvági við í alt sjey íbúðum, at taka niður millumbygningin og høvuðsumvæla verkstaðsbygningin.

Útreiðslurnar fyri byggistig 1 kunnu í mesta lagi vera 19,8 mió. kr.

Kostnaðarmetingin, sum Landsverk hevur gjørt, er grundað á byggiskrá, verandi umstøður og forkanningar. Metingin rúmar útreiðslur í sambandi við at dagføra og umvæla ognirnar á Leitisvegi, at taka niður millumbygningin og heildarumvæla verkstaðsbygningin.

**Útreiðslurnar eru býttar yvir ár**

| **Ár** | **2026** | **2027** |
|---|---|---|
| **Útreiðslur** | 7,2 mió. kr. | 12,6 mió. kr. |

**Til § 2**
Greinin er gildiskomuregla og sólseturáseting. Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og lógin fer úr gildi 31. desember 2031.

Ásetingin tekur støði í byggiætlanini og teimum royndum, sum eru gjørdar seinastu árini, sum vísa á, at seinkingar, ið ikki víðka fíggjarkarmin, aloftast koma fyri.

Sambært tíðarætlanini, sum Landsverk hevur gjørt, verður byggistig 1 liðugt í 2027 og byggistig 2 í 2028. Samanlagt eru 20 mánaðir settir av til byggistig 1.

Landsverk metir, at tað er nøktandi tíð undir vanligum umstøðum at dagføra og umvæla ein bygning á 720 $m^2$

Verkætlanartíðarætlanin leggur ikki upp fyri seinkingum í byggingini, tá hetta ikki verður væntað. Tíðarætlanin leggur tó upp fyri møguligum spilldøgum í vetrarhálvum.

Almanna- og heilsumálaráðið, 21. januar 2026

**Margit Stórá**
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Byggiskrá Sambýlið Birtulíð - Leitisvegur
Fylgiskjal 2: Lendis- og skipanarætlan
Fylgiskjal 3: Tíðarætlan
Fylgiskjal 4: AV rakstrarkostnaður